## Ikki starv til samkynd



Bispurin í Bergen, Ole D. Hagesæther, hevur lýst eitt starv sum prestur í sóknini Bjordal/Ortnevik leyst, men bispur ger týðiliga vart við við, at tað eru ikki allir prestar, sum kunnu søkja starvið. Í lýsingini stendur, at samkyndir prestar, sum liva í skrásettum parlagi, skulu ikki søkja, tí teir fáa ikki starvið. Onkur politikari heldur, at bispur diskriminerar, men bispur sigur við Bergens Tidende, at lýsingin er í samsvari við galdandi reglur.

## Atgongumerki fáast til Stig Rossen

Atgongumerkjasølan til konsertirnar við Stig Rossen og Tamru Rosanes byrjaði í dag kl. 10.00. Konsertirnar báðar verða Leygardagin 20. oktober í Norðurlandahúsinum, onnur við Stig Rossen og onnur við Tamra Rosanes. Atgongumerki kunnu keypast á heimasíðuni hjá Norðurlandahúsinum www.nlh.fo, í Kunningarstovunum í Havn, í Runavík og í Fuglafirði. Tey, sum ynskja at keypa atgongumerki til báðar konsertirnar, men sum ikki hava møguleika at møta upp á sølustøðunum, kunnu ringja til Norðurlandahúsið ella kunningarstovurnar í Havn, Runavík ella Fuglafirði.

# aldømi í Føroyum

streyminum, tí hann heldur, at besta loysnin er at gera eitt valdømi til hvønn tinglim.

Sum tingmannatalið er nú, skulu tað sostatt vera 32 valdømi í Føroyum.

- Tað, sum er umráðandi fyri meg, er, at fólkaræðið kemur so nær borgarunum sum gjørligt og at tann førdi politikkurin verður í samsvari við tað, sum fólk velja.

- Og skipa vit Føroyar í einmans-valdømi fáa vit ein nógv ruddiligari politikk, sigur Anfinn Kallsberg.

Tað heldur hann ikki, at vit hava í dag.

### Kenna seg ikki aftur

- Sum støðan er nú, fara allir flokkar til val við hvør sínari valskrá. Tá ið valið er av, fara einir tríggir ella fýra flokkar í samgongu, har teir allir mugu geva og taka.

- Tað merkir, at vit fáa ein politikk, sum er ein neyðsemja ímillum politikkin hjá trimum ella fýra flokkum og sum sostatt ikki er ein politikkur, sum flokkarnir hvør sær, kunnu kennast við.

- Men tað merkir eisini, politikkurin, sum hvør einstakur flokkur førir í eini samgongu, er langt burtur frá teimum sjónarmiðjum, sum veljarin atkvøddi fyri og tí kennir veljarin seg ofta ikki aftur í tí politikki, sum flokkur hansara førir í eini samgongu.

- Sum støðan er nú, veit veljarin í veruleikanum ikki, hvat hann fær, tá ið hann hevur valt ein flokk, tí kemur flokkurin í samgongu, má hann gera so nógvar neyðsemjur, at politikkurin hjá flokkinum er ikki at kenna aftur, tí samgongan má føra ein politikk, sum er ein samanvavstur av trimum ella fýra flokkum í eini samgongu.

Samstundis verður andstøðan skúgvað til viks og fær at kalla onga ávirkan.

### Vinnarin fer við øllum

- Skipa vit Føroyar í einmans valdømi, fáa vit eina skipan, sum líkist teirri ensku skipanini, har tann flokkur, sum vinnur valið, eisini fær stjórnarvaldið og fær ført sín egna politikk og tað er tann politikkur, sum fekk veljaran at velja flokkinum.

- Tá ið val verður aftur, kann veljarin so gera støðuna upp við seg sjálvan um hann skal velja flokkin aftur, ella royna okkurt annað.

- Tá kann veljarin gera av, um hesin ávísi flokkurin hevur ført ein politikk, sum kann góðtakast og um hann tí skal veljast aftur, ella um onkur annar skal sleppa framat við einum nýggjum politikki.

Anfinn Kallsberg viðgongur kortini, at hetta er eitt sjónarmið, sum hann stendur rættiliga einsamallur við.

- Men sum skipanin er nú, hava vit eina skipan, har tað ofta er rættiliga langt frá tí, sum veljarin vil hava og til tann politikk, sum verður førdur, tí ein samgonga noyðist at laga seg til allar tær neyðsemjur, sum eitt politiskt samstarv tvørturum flokksmørk ber í sær, sigur Anfinn Kallsberg.

- So kunnu vit altíð spyrja, hvat gagnar fólkaræðinum best, leggur hann afturat.



*- Við teirri valskipan, vit hava nú, er tann førdi politikkurin ofta rættiliga langt frá tí, sum veljarin vildi hava. Gera vit Føroyar til 32 valdømi, fáa vit ein nógv ruddiligari politikk, heldur Anfinn Kallsberg*

# d Joensen sprongt løgtingið

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Framferðin hjá Edmundi Joensen, løgtingsformanni, er heilt burturvið.

Tað heldur fyrrverandi løgtingsformaðurin, Anfinn Kallsberg.

Anfinn Kallsberg er okkara royndasti politikari við so nógvum politiskum álitisstørvum í viðførinum eftir síni 27 ár í landspolitikki, at hann er nú er tann politikkarum, sum hevur roynt mest av teimum, sum nú sita á tingi.

Vit hava spurt hann, hvat hann heldur um leiklutin hjá løgtingsformanninum, sum nú situr og um skilið í samgonguni, sum heild.

### Edmund út um alt mark

Hann heldur, at Edmund Joensen er farin út um alt mark, tí tað er als ikki hansara uppgáva at leggja eitt uppskot fyri løgtingið um at gera Føroyar til eitt valdømi.

- Høvuðsuppgávan hjá løgtingsformanninum er at vera formaður fyri alt løgtingið. Uppgávan hjá honum er at savna løgtingið og tað er ikki hansara uppgáva at leggja uppskot fyri løgtingið.

Anfinn Kallsberg heldur, at tað sjálvandi kann forsvarast, at ein løgtingsformaður leggur eitt uppskot fram fyri eitt samt løgting ella ein samdan formansskap um tingskipanina ella okkurt annað av tí slagnum.

- Men ein løgtingsformaður við einum savnandi leikluti, eigur undir ongum umstøðum at leggja eitt uppskot fyri løgtingið, sum er so umstrítt sum hetta.

- Í hesum sambandi hevur Edmund Joensen lagt eitt uppskot fram, sum hevur kvett alt løgtingið av um tvøran. Enntá sjálvur formansskapurin í løgtinginum er eisini farin av um tvøran, tí eisini hann er ósamdur um ætlanina. Harafturat er hetta eitt mál, sum allir flokkar eru ósamdir um innanfloks og sostatt hevur Edmund Joensen eisini kvett samgonguna og teir einstøku flokkarnar av um tvøran.

### Vandi fyri ruðuleika

Men eitt er, at Edmund Joensen leggur eitt umstrítt uppskot fyri Løgtingið, sum tingformaður. Eitt annað er, at hann ger tað sum limur í samgonguni..

- Eg haldi ikki at einstakir tinglimir í samgonguni eiga at leggja uppskot fyri løgtingið í sjálvdrátti, tí samgongan eigur at semjast um tey málini, sum verða løgd fram.

Anfinn Kallsberg sigur, at hetta málið hevur ført við sær, at tinglimir hava hótt samgonguna og enntá sín egna flokk.

- Tað fremur avgjørt ikki samstarvið í samgonguni, tí tað ger uppgávuna hjá henni nógv torførari á øðrum økjum eisini.

- Tá ið ein einstakur løgtingsmaður í samgonguni er farin í sjálvdrátt, er tað ein spurningur, um fleiri fara at taka sær sama rættin. Tí kann hetta enda við einum ógvuliga stórum trupulleika hjá samgonguni.

Hvussu sært tú møguleikarnar fyri at gera ein fíggjarlóg undir hesum umstøðunum?

- Tað er altíð torført at gera eina fíggjarlóg, men koma vit hartil, at tinglimir í samgonguni fara at kenna seg óheftar av semjum og avtalum, síggi eg ruðuleika fyri mær. Tað er tað ringasta, sum kann og tað eiga vit at fyribyrgja.

Men hevði tað so verið rætt at útskriva nýval beinanvegin?

- Eg haldi ikki, at tað tað er rætt at útskriva nýval í óðum verkum. Men verður róð framundir anarki, so at tað ikki ber til at gera avtalur og so at tinglimir ikki kenna seg bundnar av gjørdum semjum, verður alt verður tann beri ruðuleiki og so er tað ein annar spurningur, sigur Anfinn Kallsberg.